**Í ÓÐAMANSGARÐI**

**Listahátíð – Opera – Þjóðleikhúsið** (4½ stjørnu av 5)

Sunleif hevur vovið silkimjúkan dúk, sum leggur seg eins og tám uttan um søguna

Í Óðamansgarði, opera eftir Sunleif Rasmussen, bygd á stuttsøgu eftir William Heinesen. Operatekstur eftir Dánial Hoydal. Leikstjórn: Ria Tórgarð. Leikarar: Gunnvá Zachariasen og Hans Tórgarð. Sangarar: Bjarni Thor Kristinsson, Eyjólfur Eyjólfsson og Þóra Einarsdóttir. Dansarar: Frank Fannar Pedersen og Unnur Elísabet Gunnarsdóttir. Danshøvundur: Lára Stefánsdóttir. Pallmyndir og búnar: Elisa Heinesen. Ljós: Lárus Björnsson. Ljómliðið Aldubáran leikti, Bernarður Wilkinsson stjórnaði. Uppseting: Þjóðleikhúsið og Tjóðpallurin.

Í heimsins bábelstornum sveima dreymar okkara, tað sum er okkum ókent, men sum vit tráa so inniliga eftir. Vit hava ein gruna um, at har finna vit tað, sum nøktar forvitni okkara um lívið. Er tað ástin? Er tað lystin? Er tað sannleikin um, hví vit eru her, "einsamir fuglar í Óðamansgarði okkara?"

Stella Kristina og Marselius stríðast við tað vandamál, hin trega, sum vit øll kenna, at verða vaksin, og tey eru stødd í garðinum hjá óðum manni. Hesin øri maður veit. Hann kennir ástina, kennir harmin, hevur verið gjøgnum hetta alt, mist konuna, og vera kann, at hann er drápsmaður eisini. Hesar lívsroyndir hava gjørt hann óðan í høvdinum, hann er eitt ræðuligt menniskja, og í garði hansara er freisting og synd.

Søgan eftir Willam Heinesen um ta gráastu gátu er yndislig, sveipað í dularfullan og tónandi vakurleika. Sunleif Rasmussen hevur áður smíðað tónaverk eftir hetta sama skald, og um hetta ikki var eitt bæriligt ummæli, tá hevði sagt, at teir eru sum krókur og lykkja.

Tónlist Sunleifs vellir nevniliga úr sama dularfulla og tónaríka tokka sum skaldskapur Willams. Við tónlist síni vevur hann silkimjúkan dúk, sum legst eins og tám uttan um søguna og gevur henni nýggja dýpd. Tónlistin er impressiónistisk, gjøgnumskygd og erfín, full av smáum tónabrøgdum, sum lokka oyrað og hugtaka sinnið. Har eru ørstuttar soloir á streingjum, frá klokkum í slagverki og úr hornum, sum draga lurtaran at torninum á heimsins enda, har sum eingin veit, hvat henda kann.

Í Óðamansgarði er óvanlig opera, tí Stella Kristina og Marselius liva í trinnanda víddum av tilveru síni - sjónleiki, songi og dansi. Sjónleikurin er eins og resitativ, songurin er innari røddin, og dansurin er hugflogsheimurin, sum tey stremba so inniliga eftir. Einasti leiklutur, sum líkist operaleikluti, er ørvitisknokkurin, sum Bjarni Thor Kristinsson tulkaði við teirri styrki og øði, sum leikluturin biður um, men hann fangaði eisini eymleikan og lýrikkina í einari viðkvæmari sál, sum hevur mist ástina.

Tey seks listafólkini í leikleitunum sum Stella Kristina og Marselius tulkaðu hvør í sínum lagi søguna avbera væl, og serstakliga hugtakandi var at síggja, hvussu dansurin gav verkinum dýpd, tó at plássið, sum dansaranir høvdu, var lítið. Ljómliðið spældi væl, gjørdi einki mistak og væl var hugsað um heildina í verkinum.

Í Óðamansgarði er vakurt listaverk, sum fæst við tað besta og sterkasta í okkum øllum – at vilja liva.

*Bergþóra Jónsdóttir*

*Ummæli úr Morgunblaðnum.*

*Týtt til føroyskt: Sveinur Ísheim Tummasson*